

Óli Jacobsen

*Kristeligt Dagblad:*

# FÆRING BRAGTE GRUSOMHEDER I CONGO FREM I LYSET

***Søgan um Daniel J. Danielsen er væl kend í Føroyum, men hansara søga vekir eisini ans úti í heimi. Seinast í Danmark.***

Danska avísin Kristeligt Dagblad hevði mánadagin 24. august eina grein við yvirskriftini Færing bragte grusomheder i Congo frem i lyset.

Hóast Dollin var danskur ríkisborgari, hevði danskan pápa og var føddur í Danmark, hevur hann ikki vakt nakran serligan ans í Danmark.

Men henda greinin er eitt nýbrot og vísir, at danir í størri mun hava fingið eyguni upp fyri avrikinum hjá Dollanum.

Byrjanin til hetta var ein grein hjá søgufrøðingi í Berlingske Tidende seinasta ársskifti um harðræðið í Congo undir belgiska Leopold 2 kongi frá 1885 til 1908. Eg sendi høvundanum ein teldupost og kunnaði hann um søguna hjá Dollanum og hansara innsats móti hesum harðræði.




**Undirheitið á bókini Dollin, "Havnarmaðurin, sum broytti heimssøguna" er seinni váttað av fremstu serfrøðingum víða um í heiminum á hesum øki.**

Henda søgan skuldi verið natúrliga ein partur av hesi søgu.

Tað frættist einki aftur. Men í mars var ein líknandi grein í Kristeligt Dagblad hjá sama søgufrøðingi um hesa søguna hjá Congo.

Greinin hevði eitt ískoyti um Skandinaver i Fristaten Congo. Her var sagt, at seinast í 1800 talinum starvaðust 1500 til 2000 skandinavar í Congo. Nógvir av teimum vóru sjómenn á skipum, sum sigldu á Congoánni.

Millum hesar skandinavar vóru 5-600 danir.

Um danir varð sagt:

*Nogle danskere deltog aktivt i overgrebene, men langt de fleste så passivt til og passede deres arbejde.*

Men so varð skoytt upp í:

*Enkelte (danir) råbte op og vendte fristaten ryggen.*

Eg gjørdi Kristeligt Dagblad vart við, at um Dollin skuldi roknast fyri at vera dani, so var hesin setningur langt frá nøkur fullkomin lýsing av leiklutinum hjá donskum ríkisborgaranum í Congo.

Samstundis varð víst á ta søguna, sum er væl kend í Føroyum.

Men nú vísti tað seg, at Kristeligt Dagblad fekk áhuga fyri hesi søgu, og teir settu ein journalist, Tim Panduro, at skriva eina grein um D.J. Danielsen og hansara avrik í Congo.

Greinin kom so í blaðið tann 24. august. Nógv varð gjørt burtur úr. Greinin fylti tað, sum svarar til tvær síður í Sosialinum.

Oman fyri nevndu yvirskrift varð skrivað:

*Det er blevet sagt mange gange på det seneste, at europæerne har været en plage for Afrika. Men færøske Daniel Jacob*




**Keypumynd frá 1908 av Leopold kongi har hann er í sínum "national dress"**

*Danielsen var med sine foredrag og billeder af afhuggede hænder med til at vende verdensopinionen mod kolonimagternes brutale fremfærd i Fristaten Congo. Siden er han næsten gået i glemmebogen.*

Greinin vakti ans millum lesararnar á Kristelig Dagblad. Í hvussu er stóð hon frá útgávudagin mánadag til mikudag at vera millum tær mest lisnu greinirnar á heimasíðuni hjá blaðnum.

Í Føroyum vakti hon eisini ans á sosialu miðlunum. Somuleiðis hevði Finnur Koba eitt innslag í útvarpinum um hetta mál.

Hóast nógv er skrivað um hesa søgu, er kortini okkurt, sum kann leggjast afturat.

Luttøkan hjá Dollanum sum skipari og maskinmeistari í kanningarferðini niðan og oman eftir Congoánni hjá bretska konslinum í Congo, Roger Casement, hevði verið nóg mikið at gjørt Dollan søguligan. Tað eru ikki nógvar ferðir gjørdar av hesum slag og við hesum endamáli, um nøkur.

Týdningin hjá Dollanum vísir brævið hjá Casement til bretska uttanríkismálaráðið, har hann sigur, at henda søguliga ferðin ikki hevði verið møgulig uttan dugnaskapin hjá Dollanum. Her kann eisini havast í huganum, at ferðin varð gjørd ta árstíðina, tá ið vatnstandurin í ánni var lægstur, og tað tí var størstur vandi fyri, at teir sigldu seg fastar á sandriv og aðrar forðingar.

## Amerikanskur søgufrøðingur tekur í egnan barm

Tim Panduro hevur havt samband við søgufrøðingar, ið eru serfrøðingar júst á hesum økinum. Ein av teimum er Kevin Grant, viðurkendur søguprofessari.

Sagt verður í greinini:

*Selv om billederne af afhuggede hænder og andre grusomheder i reglen tilskrives andre fotografer, har forfatteren Óli Jacobsen sandsynligvis ret i sin påstand om at mange reelt er taget af Daniel J. Danielsen. Det vurderer historieprofessor på Hamilton College i New York, Kevin Grant, der har forsket i Congo Reform Association (rørslan sum stríddist móti harðræðinum í Congo). Han kalder Oli Jacobsens dokumentation "overbevisende."*

Tað áhugaverda er, at sami Kevin Grant í 2005 gav út bókina "A Civilised Slavery", sum millum annað eisini umrøddi henda partin av søguni í Congo. Tá visti hann einki um Dollan, og tí var hansara frásøgn um hetta tíðarskeið sera misvísandi. Heiðurin fyri tað, sum Dollin próvfast gjørdi, gav hann leiðaranum á teirri missiónsstøðini, har Dollin virkaði, Douglas William Armstrong. Hetta var púra skeivt.

Eg hevði samband við Kevin Grant, meðan eg skrivaði um Dollan frá 2007 og úteftir og greiddi frá mínum niðurstøðum. Hann gav mær fullkomiliga rætt, soleiðis sum tað eisini sæst í greinini í Kristeligt Dagblad.

## Myndirnar høvdu avgerandi týdning

Í hesi grein í Kristeligt Dagblad er áhugaverd lýsing av týdninginum av myndunum. Hesin partur hevur yvirskriftina *"Billederne fik enorm betydning"* við undiryvirskriftini: *"Fotodokumentation var med til at skabe opmærksomhed om lokalbefolkningens lidelser i Congo."*

Tað skrivaða og talaða orðið kann altíð trætast til lygn.Men tað kundi ikki gerast

***Komandi partur***
***Í komandi parti verður greitt frá Knúti Olsen, sum var við vanlukkuflogfarinum í 1970, og sum annar av teimum, sum gekk til bygdina í Mykinesi og boðaði frá vanlukkuni.***

við myndum, serliga tá tann, sum hevði tikið myndirnar, kundi greiða frá søguni aftanfyri tær.

Við tí tilfari, sum er tøkt, kann sigast við vissu, at Dollin var tann fyrsti sum tók umrøddu myndir, og hann var tann fyrsti skipaði fyri eini fundarrøð, har hann umframt frágreiðing um støðuna vísti slíkar myndir alment.

Hetta eru sjónarmið, sum lýsa týdningin av myndunum hjá Dollanum.

Tann umrøddi Kevin Grant sigur í greinini í KD:

*Fotografier spillede en vigtig rolle i reformbevægelsen. De bekræftede de beskyldninger om grusomheder og slaveri, som missionærer og handelsfolk havde fremført i årevis, men som officielle kilder havde havde afvist med deres egen fortælling om, at der var talen om en civiliseringsmission.*

*Desuden gjorde fotografier det muligt for reformbevægelsen at gøre kampagnen mere sensationel og fange offentlighedens opmærksomhed, uanset om det var gennem lanterna magica (ljósmynda) foredrag eller gennem aviser eller gennem magasiner.*

Danielsen er historisk vigtig, fordi han var en af de første missionærer i Congo, der erkendte fotografiets magt som bevismateriale. Det var ikke kun hans fortjeneste, at reformbevægelsen blev omdannet til en international, folkelig kampanje, men han spille en vigtig rolle i processen.

Í greinini er eisini frásøgn hjá Jesper Kurt Nielsen, sum er Afrikaserkønur á danska tjóðarsavninum. Hann sigur, at myndaprógv taldu nógv í umdøminum av Congo tá í tíðini:

*Det var stadigt tidligt i fotografiets tidsalder, og det fik en enorm betydning. I et samfund, hvor der normalt var ting, men ikke talte om, så man pludseligt reportagefotografier af lemlæstede mennesker. Det må have skabt chockbølger, også fordi myten fra Leopolds side var, at man var i Congo for at etablere civilisationen og standse den arabiske slavehandel i området. Pludseligt så man, at europæerne ikke altid levede op til kristen næstekærlighed.*

## Morel fekk avgerandi krútið frá Dollanum

Tað er sjálvsagt rætt, at Dollin ikki var einsamallur í hesi søgu. Umframt onnur hevur verið ein annar skandinavi, sum hevur gjørt vart við viðurskiftini í Congo. Tað var svenski trúboðarin Edvard Vilhelm Sjøblom, sum í 1896 skrivaði eina grein um yvirgangin móti fólkinum í Congo.

Teir, sum upprunaliga gjørdu vart við viðurskifti, høvdu so ta ávirkan, at bretska stjórnin setti umrøddu kanning hjá Casement í verk í 1903.

Ein av høvuðsmonnunum í hesi herferð í Bretlandi var Edmund Morel. Hann arbeiddi hjá tí skipafelagnum, sum sigldi millum Congo og Europa.

Tá ið hann sá, at tað, sum kom heim úr Congo var gummi, filabein og líknandi vørur, og tað, sum varð sent til Congo, mest var vápn og skreytvørur ætlaðar hvíta fólkinum har, varnaðist hann, at her var okkurt galið. Hetta minti ov nógv um alment trælahald.

Morel fór tá at skriva um hesi viðurskifti í blaði sínum West African Mail. Tá ið Dollin kom heim og helt sínar fyrilestrar gekk sjón fyri søgn, hvussu støðan var í Congo.

Tað er eitt áhugavert brævaskifti til skjals í London millum teir báðar, sum er ein týðandi kelda til hesa søgu um Dollan.

Her er Morel altráur eftir at fáa fatur í myndunum, sum Dollin kom heim við úr Congo. Og nakrar tær fyrstu myndirnar, sum Morel prentaði, vóru júst hesar.

Í blaðnum hjá Morel var eisini frásøgn frá einum av fundunum, sum Dollin hevði í Bretlandi. Hon er prentað í bókunum um Dollan. Her greiðir hann frá sum eygnavitni um tað, sum hann hevði sæð av ræðuleikum. Her legði Dollin eisini dent á, at hann hevði lovað fólkinum í Congo at greiða fólkinum í Europa frá støðuni.

Tað var eisini hugskotið hjá Morel at fáa innihaldið á hesum fundum gjørt kunnugt fyri onnur, sum t.d. pressuni. Tað varð eisini gjørt.

Tískil var tað Dollin, sum gav Morel tann serliga íblástur, sum eisini gjørdi sítt, at hann fekk eitt pláss í søguni.

Morel varð í mars 1904 oddamaður í tí nýstovnaða Congo Reform Associaton. Ein týðandi partur av virkseminum var tilfar, sum var komið frá trúboðarum. Serliga kend er trúboðaraparið John og Alice Harris. Tey vóru ikki hugað fyri hesum máli, fyrr enn Dollin kom upp í leikin, og tað sást, at hetta var ein góð søk.



***Ein eyðkend mynd hjá Dollanum. Avkvetta armurin á einum hvítum klæði, so hann gerst meira sjónligur.***



***Trúboðaraparið John og Alice Harris. Tey hava í 100 ár av órøttum fingið heiðurin fyri avrikið hjá Dollanum.***

Tey bæði hava annars av mongum fingið æruna av hesum søguliga myndum og av at vera íblástur til Congoherferðina, sum Dollin byrjaði í 1903 í Bretlandi. Men tað tann staðfestast, at teirra fyrsta kenda mynd er frá mai 1904, meðan tær hjá Dollanum prófvast eru frá heystinum 1903. Tey komu heldur ikki upp í Congoherferðina fyrr enn í 1906, tá ið tey fóru úr Congo til Bretlands.

Umrøddi felagskapur, stuttnevndur CRA, skipaði fyri herferðini móti Leopold 2. kongi inntil 1908, tá ið hann gav skarvin yvir og læt Congo yvir til belgiska statin. Hetta broytti støðuna hjá fólkinum mundandi.

## Dollin burturtagdur av teimum hann hjálpti

Morel skrivaði eisini fleiri bøkur um Congo. Tann mest kenda er Red Rubber, sum kom út í 1906 og seinni í fleiri útgávum. Henda bók er eisini komin út á norskum við navninum Kongelig Slavelejr.

Skjalasavnið hjá Morel í London er ein tann fremsta keldan til ta søgu, sum nú prógvar leiklutin hjá Dollanum, og sum Morel sjálvur fekk nógva nyttu burturúr.

Men tað merkiliga er, at hóast hetta, so nevnir Morel ikki Dollan við einum orði í sínum bókum, sum hann skrivaði seinni. Nú er tað leiðarin fyri Balolo missiónini, Harry Grattan Guinness, sum fær heiðurin fyri at hava byrjað umrøddu fundarrøð, hóast tað er prófvast, at tað var Dollin, sum byrjaði hana, og at tað ímóti viljanum hjá Guinness. Tað var ikki fyrr enn seinni, tá ið sá tann ans, sum fundarrøðin hjá Dollanum vakti, at Guinness fór upp í hetta stríð.

Egna missiónin hjá Dollanum tagdi hann eisini miðvíst burtur, og tað eydnaðist í meira enn 100 ár.

## Dollin viðurkendur av søgufrøðingum

Henda søgan um Dollan er viðurkend av søgufrøðingum í fleiri londum. Í Norðurlondum er hann viðurkendur av norskum søgufrøðingum.

Ein norskur søgufrøðingur, sum hevur skrivað ein bók um søguna hjá Afrika, skrivaði um ensku bókina um Dollan:

*Det er en fascinerende historie, både personlig og i tilknytningen til den allmenne tematikken. Jeg tror aldri jeg har kommet så på innsiden av Reform kampanjen som gjennom din fremstilling, den belyser så konkret mange av de vesentlige indre forbindelser og spenninger i denne bevegelsen, ikke minst misjonærenes stilling. Du har behandlet dette med streng faglig kritikk, og dine konklusjoner blir derved desto mer troverdige, spesielt viktig er dette mht hvem som har produsert mange av de viktige fotografiene, de er jo fortsatt gjengangere i alle fremstillinger av denne delen av Kongos historie. Spørsmålet om hvorfor Danielsen er glemt, berører også allmenn problematikk. Man gleder seg når noen som fortjener det trekkes fram igjen, slik du har gjort.*

Tað eru líknandi ummæli komin frá søgufrøðingum í fleiri londum sum í USA, Canada, Írlandi, Bretlandi, Hollandi og Belgia. Tískil kann sigast, at henda søgan er viðurkend av søgufólki á ovastu rók. Tær flestu greinir og bøkur, sum nú verða skrivaðar um Congo, hava eisini tilvísingar til leiklutin hjá Daniel J. Danielsen.

Bókin um Dollan á enskum og annað tilfar um hesa søgu kann annars lesast á heimasíðuni:

www.olijacobsen.com



***Edmund Morel hevði ein týðandi leiklut í uppgerðini við stýrið hjá Leopold 2. Hóast stuðulin frá Dollanum, verður hann púra burtagdur í seinni søguskrivingini hjá Morel.***